Um tit eru fleiri, sum vitja sama persón samstundis, er tað best, um tit fara inn í kamarið at vitja. Tit kunnu eisini seta tykkum inn í seturstovurnar.

Avvarðandi kunnu keypa sær heitar drykkir úr automatini í matarsalinum.

Høvuðsdyrnar lata upp kl. 6.00 og steingja kl. 0.15

## Tilboð úr køkinum

Avvarðandi kunnu eisini keypa mat í heiminum, men tá skal bíleggjast frammanundan. Bílegging fer fram við at seta seg í samband við røktarstarvsfólk. Goldið verður í reiðum peningi í sambandi við bílegging. Máltíðin verður etin í kamarinum. Av praktiskum ávum, kunnu bert 4 avvarðandi eta hvørja ferð.

Gerandisdagar skal bíleggjast áðrenn kl. 12 dagin fyri. Vikuskifti skal bíleggjast fríggjadag áðrenn kl. 12. Høgtíðir má bíleggjast áðrenn kl. 12 tveir dagar frammanundan.

Matarskrá hongur frammi.

## Klædnavask

Møguleiki er fyri sjálvur at vaska klæðir í vaskirúminum. Um tú ikki megnar hetta, kunnu avvarðandi hjálpa tær ella taka klæðini heim at vaska.

## Parkering

Parkeringsøkið er eystanfyri bygningin.

## Royking

Tað er loyvi at roykja uttandura, á svalanum.

Eru ivamál, eru tygum ella avvarðandi vælkomin at tosa við deildarleiðaran ella onnur starvsfólk á heiminum.

Januar 2025

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA**

Postsmoga 32
FO-110 Tórshavn
+298 302010
torshavn@torshavn.fo

**UPPLATINGARTÍÐIR**

Mánadag-hósdag 9.00-16.00
Fríggjadag 9.00-15.00

Leygardag og sunnudag stongt



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

UMSORGAN OG RØKT

# Vælkomin í Urd

UMSORGAN OG RØKT

# Vælkomin í Urd

**Urd er depilin, sum veitir umlætting, rehabilitering og palliatión til borgarar í Tórshavnar kommunu, sum eru 67 ár og eldri. Í Urd starvast sjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøktarar, heilsuhjálparar, fysioterapeutar, ergoterapeutar, kostrøktarstarvsfólk, reingerðarfólk, hjálparfólk og húsavørður.**

Endamálið við virkseminum í Urd, er at veita eitt tvørfakligt og samanhangandi tilboð til heimabúgvandi borgarin, ið hevur tørv á rehabiliterandi og sjúkrarøktarfakligum átøkum alt samdøgrið í eitt styttri tíðarskeið. Tilboðið skal stuðla undir at borgarin kann liva eitt virki og innihaldsríkt lív.

Vit vilja saman við tær og tínum avvarðandi arbeiða fram ímóti at tú varðveitir og styrkir tínar førleikar, heilsu og vælveru.

Fyri at náa ásettum málum, verður væntað av tær, at tú tekur virknan lut í ætlanini fyri uppihaldinum.

Rehabilitering tekur støði í gerandis virksemi, skilt á tann hátt, at øll gerandismál eru liður í venjingini, so sum at koma upp úr songini, persónligt reinføri, at lata seg í og úr og at fáa sær at eta. Saman við tær, taka allir fakbólkar lut í rehabiliteringini og seta tvørfaklig mál.

Okkara vón er, at tú hevur ment teg og fingið betri lívsgóðsku, tá tú fert heim aftur.

**Urd**
Rólantsgøta 20 • FO-100 Tórshavn

Teldupostur urd@torshavn.fo
Telefon 30 20 00

**Beinleiðis telefon nummur:**

| | |
|---|---|
| Bólkur 1 ........... | tel. 27 01 14, 27 01 46, 27 01 75 og 27 02 26 |
| Bólkur 2 ........... | tel. 27 01 18, 27 01 91, 27 01 47 og 27 01 68 |
| Køkurin ............ | tel. 27 01 43 |
| Køksleiðari ......... | tel. 22 31 71 |
| Deildarleiðari ....... | tel. 22 41 36 |

Vinarliga nýt hesi telefonnummur, tá samrøður snúgva seg um húsfólk.

## Innrættan

Urd lat upp í apríl 2021. Depilin liggur í náttúruvøkrum umhvørvi í Hoyvíkshædd.

Húsið er innrættað í einari hædd. Í hjartanum av húsinum liggja glæsilig venjingarhøli og  matarsalurin, sum er savnandi staðið. Eisini er stórkøkur, tvær dagligstovur og vaskirúm til egið klæðnavask.

Í Urd eru 27 kømur. Á hvørjum kamari er baðirúm, song, náttborð, skáp, spísiborð við tveimum stólum, lenistólur, og sjónvarp. Á kamarinum er útgongd til terassu.

Góðir møguleikar eru fyri rørslu innan- og uttandura, bæði til gongu og í koyristóli.

Uttandura er terassa undir taki við terassuhitarum, góðar gøtur at ganga túr og upplivað nátturuna í økinum.

## Máltíðir

Køkurin veitur fjølbroyttan og heilsugóðan mat, sum er tillagaður einstaka borgaranum. Til allar máltíðir er sjálvtøkuborð. Um tørvur er á tí, veitir starvsfólkið hjálp til máltíðirnar.

Morgunmatur er frá kl. 8.00-10.30
Døgurði er frá kl. 12.00-13.00
Nátturði er frá kl. 18.00-19.00

Millummáli og kvølddrekka er at fáa í dagligstovunum kl. 14.30-16.00 og 20.00-21.30.

Møguleiki er fyri at gera sær ein drekkamunn í dagligstovunum ella at keypa ymiskar heitar drykkir í matarhøllini.

## At hava við

Klæðir til ymisk høvi, so sum innanduravenjing, heit klæði at fara í uttandura, góðar skógvar at venja í, inniskógvar, uttandura skógvar, lutir til reinføri, t.d. sjampo, hárbust, tannbust v.m.

Neyðugt er, at tú tekur øll hjálpartól við, sum tú brúkar heima. T.d. rollator, blæður, kateturposar, sondumat. Øll útgerð sum er tengd at tínum umstøðum.

Urd veitir ikki trygd fyri kostnaðarmiklum skreytlutum, pengum, prýðislutum o.ø.

## Kostnaður

Kostnaður fyri uppihaldið pr. samdøgur, sæst her undir brúkaragjøld:  Heilsu- og umsorganartænastan – prístalva

## Avvarðandi

Starvsfólkið í Urd ynskir at hava gott samstarv við avvarðandi. Tit eru altíð vælkomin at seta tykkum í samband við starvsfólk í eindini. Væntað verður, at avvarðandi hava ein aktivan leiklut, so sum at fylgja sínum nærmasta til ørindi uttan fyri húsið, t.d. lækna, frisør o.a.

## Læknaviðurskifti

Um neyðugt samskifta vit við tín lækna. Um tú skal til lækna ella aðrar kanningar og viðtalur, og ikki megnar hetta sjálv/-ur, mást tú sjálv/-ur gera avtalu við avvarðandi um at fara við tær.

Starvsfólk í Urd hava ikki møguleika at fara við tær ella at koyra teg.

## Virksemi

Urd er eitt livandi stað, har virksemi er hugsað inn í allan gerandisdagin.

Hetta kann vera hugni við tónleiki, filmskvøld, gudstænasta, gongutúrar, túrar út úr húsinum o.a.

Avvarðandi eru vælkomin at skipa fyri virksemi og hugnaløtum.

Venjingarhølini eru opin alt samdøgrið til tín at nýta.

## Vitjan/gestir

Vitjandi eru altíð vælkomin í Urd, undantikið meðan máltíðirnar eru, og eftir kl 22 á kvøldi.

Vit eta døgurða kl 12-13 og nátturða kl 18-19

Summir borgarir hava fastar venjingartíðir. Hesar standa á talvuni inni á kamarinum hjá borgarunum. Best er, um tey ikki fáa vitjan, meðan venjing er.